**UTTAN ÚR HEIMI**

## Heykur fer frá

Ein av teimum ídnastu talsmonnunum fyri amerikansku krígsførsluni í Irak, Pentagon-ráðgevin Richard Pearle, hevur lagt frá sær. Pearle, sum ofta hevur verið nevndur "Myrkursins prinsur", hevur verið formaður í tí bólkinum, sum gevur Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra ráð í politiskum málum.

Orsøkin til avgerð hansara er, at hann er settur í samband við eina fíggjargølu. Sambært henni hevur hann tryggjað einari ávísari fyritøku sáttmálar við tað almenna uttan um ta vanligu mannagongdina. Sum samsýning hevur hann fingið 725.000 dollarar og aðrar 600.000 dollarar, tá sáttmálarnir eru endaliga undirskrivaðir. Sjálvur sigur Pearle, at hann er ósekur, men at hann kortini hevur valt at fara frá, fyri at gølan ikki skal órógva arbeiðið hjá verjumálaráðharranum, sum hevur annað at hugsa um í hesum døgum.

Richard Pearle var varaverjumálaráðharri í forsetatíðini hjá Ronald Reagan. Tá var hann ein tann harðasti mótstøðumaðurin ímóti avvápnaðarsáttmálunum við Sovjetsamveldið. Hann hevur verið roknaður millum teir mest konservativu heykarnar hjá Bush-stjórnini.

## Siga framvegis nei

Ein stórur meiriluti av týska fólkinum er framvegis ímóti krígnum við Irak.

Ein meiningakanning, sum varð almannakunngjørd í gjár, vísir, at heili 83 prosent av teimum spurdu eru ímóti, at USA og Bretland hava lopið á Itak. Bara 12 prosent siga, at amerikanarar og bretar gjørdu rætt. Kanningin, sum sjónvarpið NDR hevur gjørt, vísir eisini, at 61 prosent av týskarunum taka undir við, at Týskland skal taka lut í arbeiðinum at byggja Irak uppaftur aftan á kríggið.

Annars halda flestu týskarar, at sjónvarpsstøðirnar gera alt ov nógv burtur úr krígnum í Irak. Tað siga 64 prosent av teimum, sum NDR spurdi.

## Japan njósnast í luftini

≤Japanar skutu í gjár eina rakett við tveimum njósnarafylgisveinum út í atmosferuna . Eygleiðarar halda, at japanska stigið fer at møta mótstøðu í Norðurkorea, og at norðurkoreanar ivaleyst fara at vísa sína misnøgd við at royna eina langtberandi rakett.

Upprunaliga ætlaðu japanar at senda ein ella tveir njósnarafylgisveinar í ringrás um Jørðina longu í 1998, men ætlanin varð løgd til viks, tá Norðurkorea sama árið sendi eina langtberandi rakett tvørtur um Japan út í Kyrrahavið. Táverandi stjórnin í Tokyo valdi at útseta fylgisveinaætlanina fyri ikki at økja spenningin millum tey bæði londini.

Longu áðrenn teir báðir japansku njósnarafylgisveinarnir vórðu sendir út í gjár, hevði norðurkoreanska stjórnin boðað frá, at hon metir japanska stigið sum eitt fíggindaligt tiltak. Herfyri skutu norðurkoreanar tvær stuttberandi rakettir út í Japanska Havið.

## Arbeiðsloysið veksur

Talið á arbeiðsleysum veksur skjótt í Danmark. Í februar mistu næstan 5.000 danir arbeiði, og seinasta mánaðarskiftið høvdu 159.500 danir einki arbeiði. Tað svarar til 5,7 prosent av donsku arbeiðsmegini, og so stórt hevur arbeiðsloysið ikki verið seinastu fýra árini.

Danska stjórnin hevði væntað, at arbeiðsloysið fór at veksa, men vøksturin hevur verið størri enn mett. Samanborið við februar í fjør eru 22.000 fleiri danir arbeiðsleysir í dag. Hagtølini vísa, at tað eru serliga akademikarar, fólk í byggivinnuni og fólk við KT-útbúgving, sum einki arbeiði hava.

Danskir búskaparfrøðingar eru ikki heilt samdir um, hví gongdin er, sum hon er, men teir tykjast harafturímóti á einum máli um, at arbeiðsloysið fer at veksa uppaftur meiri teir næstu mánaðarnar. Teir vísa á, at veksandi arbeiðsloysi skerjir ta privatu nýtsluna, og tað fer at ávirka danska búskapin.

# Risabumbur yvir Bagdad

**Amerikanarar eru nú farnir at nýta risasterkar bumbur í álopinum á Bagdad. Tær fyrstu vórðu nýttar gjáranáttina.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*



*Amerikanarar nýta nú tvey tons tungar bumbur á álopinum á Bagdad*

Útlendsk tíðindafólk, sum eru í Bagdad, siga, at tað kendist, sum skalv allur tann irakski høvuðsstaðurin gjáranáttina. Orsøkin var, at amerikanarar høvdu slept teimum risaterku bumbunum "bukner busters" niður yvir mál í býnum.

Tað vóru tvey flogfør av B-2 slagnum, sum sleptu tveimum av teimum risaterku GBU-37 bumbunum niður yvir Bagdad í náttarmyrkrinum. Hvør bumban vigaði tvey tons, og spreingingarnar vóru øgiligar. Amerikanska herleiðslan segði í gjár, at bumburnar vórðu sleptar niður yvir eina sera týðandi samskiftisstøð hjá iraksku herleiðsluni, men arabiska sjónvarpið al-Jazeera vildi vera við, at bumburnar høvdu rakt eitt sjúkrahús og onnur mál, sum ikki eru av hernaðarligum slagi. Tær sterku bumburnar eru annars útgjørdar at raka sera beint.

Útlendsk tíðindafólk søgdu, at bumburnar høvdu rakt okkurt mál nærhendis miðbýnum í Bagdad, og at roykurin var nógvur langt út á fyrrapartin í gjár.

Hetta er fyrstu ferð, at amerikanarar hava nýtt so sterkar bumbur í Irakkrígnum.

# Latið ein snigskjútta taka sær av Saddam Hussein

**Fyrrverandi bretski Irak-hermaðurin Andy McNab heldur, at tað er óneyðugt at tveita bumbur og rakettir niður yvir Bagdad fyri at gera enda á Saddam Hussein. Ein einstakur snigskjútti hevði loyst uppgávuna við einum skoti, heldur hann.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*



*Ein einsamallur snigskjútti kann gera enda á Saddam Hussein og harvið krígnum, heldur Andy McNab*

Tá amerikanarar og bretar hava kringsett Bagdad, ber til at gera enda á Saddam Hussein. Tá kann ein snigskjútti fáa irakska leiðaran í skotmála. Einasta treytin er, at fregnartænastuarbeiðið hjá teimum sameindu er nóg gott.

Tað heldur fyrrverandi bretski Irak-hermaðurin Andy McNab. Hann hevur ávísar royndir haðani. Undir Flógvakrígnum í 1991 var hann við í einum loyniligum bretskum hermannabólki, sum arbeiddi aftan fyri hermótið í Irak. Men irakar tóku teir sjey bretsku hermenninar. Tríggir teirra doyðu, einum eydnaðist at flýggja, meðan tríggir vórðu tiknir til fanga og píndir. Teirra millum var Andy McNab.

Nú sigur fyrrverandi Irak-hermaðurin, at amerikanarar og bretar eiga at lata ein snigskjútta taka sær av Saddam Hussein. Tað ber til, heldur hann, og ein tílík koysn hevði stytt bardagan um Bagdad og harvið kríggið. Hann heldur ikki, at uppgávan hevði verið so torfør, men hon skal fyrireikast væl.

- Tað ræður um at sleppa fram at Saddam Hussein og at kvika sær burturaftur. Kríggið byrjaði við at skjóta rakettir eftir Saddam. Kann vera, at tað kann enda við einum einsamallum skoti frá einum snigskjútta, sigur Andy McNab.



# Samdir um kríggið men ikki um friðin

*Teir eru sdamdir um, hvussu kríggið við Irak skal vinnast, men ósamdir um, hvussu friðurin aftan á kríggið skal tryggjast.*

**George W. Bush, forseti og Tony Blair, forsætisráðharri eru á einum máli um, hvussu kríggið við Irak skal vinnast, men teir eru ikki samdir um, hvussu friðurin skal vinnast og tryggjast.**



KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

Á tíðindafundinum aftan á fundin í Camp David bar ikki til at hoyra, at minsta ósemja er millum amerikanska forsetan og bretska forsætisráðharran, tá tað snýr seg um, at kríggið í Irak skal vinnast, sama hvussu langa tíð tað tekur.

Men so røkkur semjan heldur ikki longur, tí teir báðir leiðararnir eru rúkandi ósamdir um, hvat skal henda í Irak aftan á kríggið.

Amerikanska stjórnin hevur longu lagt sína ætlan. Verjumálaráðið Pentagon hevur fest alt á blað, og eftir tí skal Irak undir amerikanska leiðslu, so skjótt kríggið er liðugt, og amerikanarar skulu stýra øllum viðurskiftum. Tommy R. Franks, generalur, sum er ovasti fyri amerikansku og bretsku herdeildunum í Irak, skal virka sum eitt slag av einum hernaðarguvernøri í Bagdad. Hann og hansara hermenn skulu skipa fyri trygd í Irak, og fráfarni generalurin Jay Garner skal standa á odda fyri einari civilari amerikanskari umsiting, til irakar sjálvir kunnu taka við.

Eftir amerikansku ætlanini fær ST ongan lut í iraksku leiðsluni aftan á kríggið. Heimsfelagsskapurin skal harafturímóti samskipa ta humaniteru hjálpina, men eisiin tað verður undir amerikanskum hernaðareftirliti.

Hetta er ætlanin hjá Bush, men her er tað, at ósemjan við Blair tekur seg upp. Tí hvørki Bretland ella hini ES-londini vilja góðtaka amerikansku ætlanina. Tey halda tvørturímóti, at ST skal hava høvuðsleiklutin í arbeiðinum at endurreisa Irak, tí eitt virkið ST er tað einasta, sum kann tryggja Irak ta neyðugu altjóða hjálpina.

Nei, sigur amerikanska stjórnin. Hon vísir á, at USA hevur roynt ta sokallaðu ST-breytina, uttan at nakað kom burturúr. Tað eru vit, sum hava sett kríggið í verk, tað eru vit, sum gjalda kríggið, og so skulu vit eisini gera av, hvat skal henda aftan á kríggið, eru boðini úr Washhington.

### Alt fyrireikað

Seinastu tíðina hevur amerikanska stjórnarumsitingin útvegað sær fólk til ymisk størv í Irak. Talan er yvirhøvur um heryvirmenn, starvsfólk í uttanríkisráðnum og fregnartænastumenn. Felags fyri tey er, at tey eru farin úr størvum sínum fyri aldur. Sambært amerikanskum fjølmiðlum eru fleiri teirra longu komin til Kuwait, har tey bert bíða eftir, at kríggið endar.

At amerikanska stjórnin longu hevur givið amerikanskum fyritøkum sáttmálar upp á ymisk endurbyggingararbeiði í Irak tulka eygleiðarar sum enn eina amerikanska roynd at vísa øðrum, hvør tað er, sum hevur tað avgerandi orðið at siga.

Serliga Russland og Frakland hava mótmælt amerikansku framtíðarætlanunum í Irak. Eftir teirra tykki er hetta eitt slag av nýggjum hjálandapolitikki. Stjórnirnar í Moskva og París halda, at tað er flaggið hjá ST, sum skal veittra í Bagdad og ikki tað amerikanska. Annað er, at júst fransmenn og russar hava stórar handilssáttmálar við irakska stýrið, men at hesir sáttmálar eru neyvan verdir tað pappír, teir standa á.

Hvat Blair segði um hesi viðurskiftini í Camp David, er ikki greitt, men aðrastaðni hevur hann týðiliga bent á, at eins og fransmenn, russar og aðrir vilja bretar hava Irak aftur á ST-breytina.

*(Kelda: Aftenposten)*

# Ivi um avrætting

**Bretska stjórnin vil vera við, at irakar avrættaðu tveir bretskar hermenn, men kann ikki prógva tað. Irakar avsanna, og nú royna bretar at doyva tíðindini.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

Hósdagin segði bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, at irakar høvdu avrættað tveir bretskar hermenn, tann 36 ára gamla Simon Cullingworth og tann 24 ára gamla Luke Allsopp.

Men í gjár royndi talsmaðurin hjá Blair at draga í land. Við blaðið The Guardian segði talsmaðurin, at línini av teimum báðum hermonnunum vórðu funnin nakað frá akfarinum, sum teir høvdu verið í, og at nógv bendi á, at teir vóru skotnir. Hinvegin hevði forsætismálaráðið einki prógv fyri, at menninir vórðu avrættaðir, segði talsmaðurin.

Tá Tony Blair legði irakar undir at hava avrættað teir báðar hermeninar, grundaði hann tað á upplýsingar frá verjumálaráðnum, sum aftur grundaði upplýsingarnar á myndir, sum arabiska sjónvarpið al-Jazeera hevði víst.

Bretskir talsmenn á hernaðarhøvuðsstøðini í Qatar søgdu í gjár, at myndirnar hjá al-Jazeera vóru so ótýðiligar, at tað ber ikki til at siga, hvussu teir báðir menninir doyðu.

Næstringarnir hjá tí 24 ára Luke Allsopp eru í øðini um, at myndugleikarnir bera tað, sum tey kalla lygusøgur um lagnuna hjá hermonnunum. Systir Luke Allsopp, Nina Allsopp, segði við blaðið Mirror í gjár, at herleiðslan hevði boðað teimum frá, at beiggi hennara varð ikki avrættaður, men at hann var deyður, tá irakar skutu eftir akfarinum, hann var í.

Irakar hava víst skuldsetingini aftur. Kunningarmálaráðharrin fanst at, at bretski forsætisráðharrin leyg beint upp í andlitið á heimssamfelagnum, sum hann tók til.